## Danir spara streym

Fíggjarkreppan og óttin fyri veðurlagsbroytingum hava eftir øllum at døma havt stóra ávirkan á streymnýtsluna hjá dønum. Blaðið Ingeniøren skrivar, at frá 2004 til 2007 vaks streymnýtslan hjá dønum støðugt, men at hetta broyttist nógv í fjør. Ein talsmaður fyri orkuverkini sigur við blaðið, at tríggjar teir seinastu mánaðirnar í fjør minkaði streymnýtslan meiri enn trý prosent, og at bara í desember minkaði hon 4,6 prosent. Sambært talsmanninum er broytingin søgulig, tí so nógv er nýtslan ongantíð minkað eftir einum ársfjórðingi fyrr.



## Kvettætlanir í Turkalandi

Ein dómstólur í Turkalandi ákærdi í gjár 10 yvirmenn í landsins løgreglu fyri at hava verið uppi í ætlanum um at koyra turkisku stjórnina frá. Tíðindastovan Anatolia skrivar, at níggju av yvirmonnunum eru samstundis ákærdir fyri at vera limir í einum yvirgangsfelagsskapi, og rætturin gjørdi av, at teir skulu verða verandi í varðhaldi. Anatolia skrivar, at teir 10 løgreglumenninir vóru millum tey 26, sum løgreglan tók seinasta hósdag, tá hon gjørdi eitt átak ímóti einum yvirgangsfelagsskapi.

# eiðraðar



*Gunvá Zachariasen las upp yrkingina "Kata - ein seinkaður nekrologur" eftir Ebbu Hentze*



*Landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, fegnaðist um at vit sum tjóð kenna ábyrgd av føroyskum bókmentum og av at undirstrika, at tað bara eru vit í Føroyum, sum varða av føroyska dansinum*

musikalskan hátt og skapar nýggj brigdi, ið geva kvøðingini persónligan og listarligan dám.

Kvøðarar sum Martin Tórgarð bera hitt gamla føroyska heiðursheitið kvæðakempur og skapa list, tá teir fara upp á gólv. Føroyski dansurin er eitt sermerkt føroyskt íkast til heimsmentanina, og Martin Tórgarð er tí ikki bert ein kvæðakempa, men ein kempa í føroyskum mentanarlívi.

Við ótroyttiligum áhuga og virkna leikluti sínum í føroyskum dansi hevur hann latið sítt íkast til arbeiðið at varðveita og menna henda partin av tjóðararvi okkara. Fyri hetta stóra arbeiði varð veitt Martini Tórgarð Heiðursgáva Landsins.



*Jónleif Johannesen takkaði Martini Tórgarð fyri hansara megnararbeiði fyri føroyska dansin - "arvagullið" sum hann tók til*



## Heiðursgáva Landsins (kr. 75.000):

Í kunngerðini fyri at lata Heiðursgávu Landsins stendur millum annað, at virðislønarevnið skal hava virkað til frama fyri mentanarlig virði, sum hava týdning fyri føroyska mentan, list og mentanararv.

### Yvirlit yvir móttakarar:

2008: Martin Tórgarð
2007: - eingin heiðursgáva latin
2006: Jógvan Isaksen
2005: Emil Juul Thomsen
2004: - eingin heiðursgáva latin
2003: Ólavur Hátún
2002: Axel Torgarð
2001: Fuglafjarðar Sjónleikarafelag



*Martin Tórgarð fekk Heiðursgávu Landsins fyri sítt stóra arbeiði føroyska dansinum at frama sum kvøðari og kvæðakempa*